gult cyan magenta svart

Teimum falnu til minnis

Leygardagin avdúka›u sy›radalsfólk minnisvar›a yvir tey, sum farin eru av vanlukkum á sjógvi og landi

Or›:
Edvard Joensen
Myndir:
Sofus Johannesen

Jógvan Vilhelmsen og Símun Joensen avdúka›u minnisvar›an

Í d‡rdarve›ri leygardagin var so nógv fólk, sum neyvan nakrantí› hev›i veri› í Kallsoynni í senn, savna› til avdúking og vígslu av minnisvar›anum á Sy›radali. Tveir eldri sy›radalsmenn avdúka›u var›an. Biskupur vígdi hann, og vi›arei›isprestur vælsigna›i hann.

Arbeitt hevur veri› mi›víst sí›an á mikkjalsmessu 1997 vi› at fáa minnisvar›an á Sy›radali á Kallsoynni upp at standa. Nú, sløk tr‡ ár seinni, stendur ein pr‡›iligur var›i nor›anvert bygdina.

Minnisvar›an á Sy›radali hevur Árni Ziska av Strondum gjørt. Sjálvur var›in er gjørdur úr føroyskum steini, sum komin er úr Kunoy. Øki› uttan um er eisini lagt vi› føroyskum gróti, sum alt er tiki› úr Nor›oyggjum, sigur ein av stigtakarunum, Poulina Eliasen.

Á var›anum er manna›ur bátur á sí›uni, sum vendir móti sjónum. Hinumegin, ni›an móti fjallinum, er ein røktingarma›ur avmynda›ur. Solei›is eru bæ›i tey, sum fallin eru á landi, og tey, sum farin eru á sjónum, umbo›a›.

Lokalur íblástur

Á var›anum stendur ørindi 15 úr Sálmi 50 í Gamla Testamenti:

»Heit so á meg á ney›ar degi, eg skal bjarga tær, og tú skalt lova mær!«

Poulina Eliasen sigur, at júst hetta ørindi var telgt í træplátu, sum hekk uppi í lugarinum á eini gamlari sy›radalsslupp.

Í hálvringi rundan um sjálvan minnisvar›an standa nøvnini á teimum, sum farin eru av vanlukku. Stø›i› uttan um er lagt vi› malargróti, sum eisini er tiki› ymsa sta›ni úr Nor›oyggjum. Ta› eru teir tríggir klaksvíkingarnir Esmar, Jóannes og Orla, sum hava gjørt hetta arbei›i›.

Gyr›ingina rundan um øki› hevur Mikkjal Joensen á Trøllanesi gjørt.

Minnisvar›in kostar 400.000,- krónur, nú hann stendur li›ugur, sigur Poulina Eliasen. Og har er hvørt oyra goldi›, leggur hon aftrat. Peningurin er fingin til vega vi› tiltøkum, gávum, føstum stu›lum og frá ø›rum, sum lati› hava.

Men tá prísur ver›ur settur á, er ikki alt ta› sjálvbodna arbei›i›, sum lagt er í minnisvar›an, tiki› vi›. Og ta› er ikki smávegis, sigur Poulina Eliasen. Slíkt arbei›i kann ikki metast nóg høgt, og tí eiga tey øll somul eina hjartaliga tøkk uppiborna, sum tiki› hava hond í fyri at fáa hesa hugsan gjørda til verk.

Poulina Eliasen sigur, at nú ætla tey at fáa ljós sett á øki›, har minnisvar›in stendur. Næsta taki› ver›ur so at fáa pening til vega, solei›is at ljósskipan kann gerast, sum sett ver›ur í samband vi› gøtuljósini í bygdini, sigur hon.

Nógv fólk

Poulina Eliasen sigur, at tey rokna vi›, at eini 700-800 fólk vóru á Sy›radali leygardagin. Og ta› man vera eitt ta› mesta, sum yvirhøvur hevur veri› í oynni í senn, metir hon.

Strandfer›slan gjørdi eitt gott arbei›i hendan dagin og syrgdi fyri, at allur flutningur gekk upp á stás. Ternan I var tvær fer›ir fullsett á Sy›radali, og Dúgvan var ein túr á Húsum. Eisini full av fólki. Solei›is eydna›ist at fáa øll, sum ætla›u sær, í Kallsoynna leygardagin. Umframt vóru so øll tey, sum komin vóru frammanundan, og sjálvandi tey, sum búgva í oynni.

Sjálvt hátí›arhaldi› byrja›i vi›, at Asbjørn Lómaklett, sy›radalsma›ur í Klaksvík, bey› vælkomin.

Sí›an var› sjófararsálmurin: »Gu› signi vár fólk, har ta› siglir og rør« sungin. Tveir gamlir skiparar, Jógvan Vilhelmsen og Símun Joensen, sum ætta›ir eru av Sy›radali, avdúka›u sjálvan minnisvar›an.

Hans Jacob Joensen, biskupur vígdi var›an, og fólki›, sum samankomi› var, sang yrkingina: »Hvør veit á morgni at siga« hjá Magnusi Høgenni. Hendan yrkingin var› gjørd í samband vi› eina bátsvanlukku í 1963, sum kravdi tr‡ mannalív. Magnus Høgenni var tá lærari á Sy›radali.

Sí›an sang Klaksvíkskóri› undir lei›slu av Meinhardi Bjartalí›, og Asbjørn Lómaklett helt rø›u. Eftir rø›una var› aftur sungi›. Hesafer›: »Eg sigla man yvir lívsins hav«. Tá sálmurin var li›ugur leikti Alfred Reines Hals, sum er hálvur føroyingur búsitandi í Noreg, á fiól.

Bjørn Kalsø, bygdarrá›sforma›ur, helt sí›an rø›u, og Klaksvíkskóri› sang aftur. Sí›an tala›i Dorius Johannesen, sum ætta›ur er av Sy›radali, og sálmurin: »Takk Gu› fyri alt, sum hendi« var› sungin.

Eisini fólk uttan fyri sóknina eru vi› á minnisvar›anum. Í 1960 drukna›i ungur fuglfir›ingur fyri Kleivini á Blankskála. Hann bú›i í Klaksvík og var á útfer› í Kallsoynni. Systir hansara, Elsebeth Reines Hals, sum b‡r í Noreg, helt rø›u. Sí›an tala›i ein av fyrireikarunum, Poulina Eliasen.

Vi›arei›isprestur, Meinhard Bjartalí›, las Fa›irvár og vælsigna›i minnisvar›an á Sy›radali, á›renn Tjó›sangurin at enda var› sungin.

Tá hátí›arhaldi› vi› minnisvar›an, sum vardi einar tveir tímar, var av, fór alt fólki› su›ur í bygdina, har allar dyr stó›u opnar.

Solei›is sum lei› út á dagin, flutti Ternan I gestirnar av aftur oynni til Klaksvíkar, ha›ani teir sí›an aftur til hallar heim mundu venda, og hvør helt lei› at síni vrá.



Heilt nógv fólk var komi› til Sy›radals leygardagin

Ummæli

Teir raktu kamartónan!

Um vikuskifti› gingu nøkur Aldarinnar Gongutúr, me›an onnur upplivdu hann í huganum á Meiarínum. Edvard N. Debess og Teitur Lassen stó›u á odda í tónleikamyndini Aldarinnar Gongutúrur, i› var ein kærleiksváttan til Havnina, vi› tónleiki hjá Simma og Teimum av Kamarinum í ø›rvísi hami. Men teir raktu kamartónan og hugnin var í hásæti

Dagfinn Olsen

Um vikuskifti› vóru tvær framførslur av Aldarinnar Gongutúri – ein minnilig tónleikamynd.

Tórshavnar B‡rá› var vi› í samstarvinum um at gera eitthvørt í samband vi› aldaskifti› og ár 2000. Edvard Nyholm Debess eigur hugskoti› og fór saman vi› Teiti Lassen undir veruligu ætlanina. Afturat sær valdu teir at hava úrmælingarnar Leiv Thomsen, guitar, og Trygva í Brekkunum, trummur. Henda kvartett kundi ikki anna› enn bergtaka og taka áhoyraran á bóli.

Ta› vil siga, ta› kundu teir kanska. Um teir høvdu mæli› so miki› nógv í kvørnini, at løgini, sum eru fólkaogn, gjørdust ókennilig og fussiónsjazzur ella okkurt tílíkt, so er ikki víst, at øll høvdu hugna sær.

Men ta› gjørdu teir ikki. Tónarnir – klassikararnir – hjá Simma og Teimum av Kamarinum vóru í yndisligum, hugnaligum og vi›hvørt skemtiligum búnum.

Páll Danielsen, sjónleikari, hev›i leiklutin sum frásøguma›ur. Hugleiddi um, hvussu ta› var, tá fyrsti báturin rendi stevni› ímóti Tinganesi. Sum sjálvandi ikki nevndist Tinganes tá.

Framúr hugvekjandi hugle›ingar, i› tó høvdu skemt og hugna vi›. Ljó›upptøkur á ymsum stø›um kryddra›u og hvørt tær vóru púra spontanar ella lagdar tilrættis er ikki til at siga. Væl rigga›i í hvussu er, tá Páll t.d. rendi seg í fer›afólk, me›an hann stó› og hugleiddi á Tinganesi. Her er eisini upp á pláss at nevna framúr tøkningin Jónas B. Danielsen, i› st‡rdi knøttunum.

Sum heild var talan um eina minniliga tónleikamynd, har hugni og skemt kom til sín rætt, samstundis sum evni› um okkara uppruna ikki var gloymt.

Hesir frálíku tónleikarar vóru sjálvir pallmynd. Ein kundi komi› út fyri, at øgiligt hóvasták var, vi› ljósmyndum úr Havn í dag og fyrr, umframt eftirger›ir av gomlum smáttum o.s.fr. Men hetta var júst tilætla›, at so skuldi ikki vera. Ta› var, og skuldi vera, ein uppliving, har lurtarin sjálvur kom í eitt umhvørvi, har hann sjálvur gjørdi sær sínar egnu myndir og hugsanir.

Upprunagesturin

Tónleikararnir loyvdu lurtarum, ásko›arum, heilt inn í teirra tónlistakamar. Ein intim uppliving av tí hugnaliga slagnum. Tónleikarar og frásøgufólk bert ein metur frá áhoyrarunum. Og einki anna› var at hyggja at, enn júst ta›, sum gekk fyri seg.

Og júst úr aldarinnar skattkømurum høvdu teir grivi› fram føroyskar sangskattir. Vi› hegni framførdu teir Teir sigla, Hønan, Tá kvøldi› kemur, Flamman og mangt anna›.

Óiva› fór eingin órørdur útaftur. Sera skemtiligt var t.d. útsetingin av Hønuni í Túni hjá Simma. Ísta›in fyri vanliga millumspæli›, kom byrjan til Sinatra-lagi› New York New York. Eisini sangurin um fyrstu flammuna eydna›ist stak væl og skemtiliga í rættiligum bóndasciffle ella hvat ein kann kalla slíkt.

Tá Teitur sang sangin um mammuna, hjá Teimum av Kamarinum, mundi okkurt tár banka uppá fyri at sleppa út at renna. Sera vakurt og hugtakandi.

Sum heild eitt kvøld, har tónleikurin var fyri øll, eins og løgini altí› hava veri› ta›. Eingin mei›slan ella ney›tøka av gomlum klassikarum og føroyskari fólkaogn. Heldur ein yndislig váttan frá frægastu tónleikarum í Føroyum um, at her hava teir uppruna og hetta skal vi›rast.

Onnur sí›a av søguni er so, at vi› slíkari samanseting av tónleikarum kann ta› ikki ganga heilt gali›!

Frammanundan var gjørt greitt, at ein upprunagestur kom á vitjan. Eingin visti tó, hvør hesin var.

Men ta› má sigast at vera uppá sítt pláss, at ta› var Nicolina (av Kamarinum), i› trein á pall. Sjálvsagt var› hon væl fagna›. Og so sang hon m.a. Tá kvøldi› kemur. Hugtakandi og sera flott framførsla, i› Nicolina eigur rós fyri!

At greina júrt fyri teimum, i› ikki náddu at uppliva Aldarinnar Gongutúr, hvussu hesin var, letur seg neyvan gera. Sta›festast kann bert, at Simme og Tey av Kamarinum komu til sín rætt og fingu uppibornan hei›ur. Vit sluppu at kaga inn í gomul tónleikalig loynikømør. Vit fingu loyvi til at uppliva dagsins tónleikaúrmælingar lata fólkaogn í n‡ggjan búna og mugu sta›festa, at teir raktu kamartónan!!

BROYTING AV FERÐSLUNI Á KÁTA HORNINUM

Gjørt verður kunnugt, at Tórshavnar Býráð hevur samtykt, at broyta ferðsluna á Káta Horninum, tvs. á vegamótinum Sverrisgøta — Niels Finsensgøta. Hetta førir við sær, at ferðslan sum kemur frá Steinagøtu kann ikki koyra oman til Vaglið, men skal snara til høgru oman eftir Sverrisgøtu.

Harumframt skal ferðslan, sum kemur frá Tinghúsvegnum oman eftir Sverrisgøtu, snara til vinstru omaneftir Niels Finsensgøtu.Boðskelti eru uppsett á Niels Finsensgøtu og Sverrisgøtu.



Tórshavnar Kommuna
Tekniska deild

gult cyan magenta svart